B36

**BÓLTFELAGIÐ B36**
**FO-110 Tórshavn, Postrúm 1136**
**Tlf. 311936 / Fax 318036**
**www.b36.fo**

**STOVNAÐ:**
**28.03.1936**

**FORMAÐUR:**
**Kristian á Neystabø**

**MEISTARAR (7):**
**1946, 1948, 1950, 1959, 1962, 1997, 2001**

**STEYPAVINNARAR (4):**
**1965, 1991, 2001, 2003**

**GREIPUVINNARAR (1):**
**2001**

**Í 1. DEILD (58 ÁR):**
**1942-1943, 1945-1984, 1986, 1988-**

**Í EUROPA (6):**
**Meistarakapping 1998/99, 2002/2003, Steypavinnarar 1992/93, UEFA Cup 1999/00, 2000/01, Intertoto 1997/98**

# Nógv fólk at taka av

**Nýggi venjarin hjá B36, Jóannes Jakobsen, hevur ein luksustrupulleika, ið fleiri av hansara starvsfeløgum øvunda honum. Hópurin hjá B36 er nevniliga væl breiðari enn hjá hinum feløgunum**

**Terji Nielsen**
*terji@sosialurin.fo*



*Við einari blanding av yngri og eldri kreftum er eingin ivi um, at B36 fer at liggja ovarliga á stigatalvuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Trúgvu viðhaldsfólkini hjá B36 fingu ein beint frammaná, tá ið tað stutt eftir kappingarlok síðsta ár kom fram, at ímyndin av framgongdini í B36 seinastu árini, Jákup á Borg, segði ástalsfelagnum farvæl og ístaðin fór at leika við grannunum fyri norðan í HB. Tá ið tað so stutt fyri jól eisini kom fram, at ein annar av berandi kreftunum á liðnum hjá B36, Heðin á Lakjuni, valdi at ganga somu leið sum Jákup, var tað næstan sum at stoyta salt á sárið hjá viðhaldsfólkunum. Men nú er lagið betur, tí B36 hevur fingið tilgongd av nógvum sterkum og royndum leikarum, ið gera ástalsfelagið til ein avgjørdan FM-kandidat.

## Blandingur av veteranum og ungum leikarum

Hópurin hjá B36 er rættuliga áhugaverdur í ár. Meðan tað í fjør fyri ein stóran part var talan um stórar profilar, so er tað í ár talan um meiri javnt góðar leikarar. Sjálvsagt eru nakrir profilar so sum John Petersen og Pól Thorsteinsson, men ikki í sama mun sum í fjør.

Við tilgongdini av eitt nú Ronnie Samuelsen, Egil á Bø, Johannes Joensen og Jens Erik Rasmussen hevur B36 fingið fólk, ið hava drúgvar royndir í bestu deildini, og sum eisini hava verið við til at vinna okkurt gylt. Ein annar nýggjur leikari í hópinum er brasiliumaðurin Alex, ið B36 hevur leigað úr danska superligafelagnum Frem, og honum væntа teir sær nógv av í B36.

B36 hevur fyrr fingið nógvar ábreiðslur fyri, at tað unga fólkið í felagnum hevur trupult við at sleppa at royna seg á besta liðnum, og at tað fyri ein stóran part verður farið eftir leikarum úr øðrum feløgum, men henda gongd er vend seinnu árini. Fleiri ungir spælarar, ið hava spælt øll síni ungdómsár í B36, eru komnir á liðið og hava bitið seg fastan. Dømir um hetta eru eitt nú Tróndur Vatnhamar, Kenneth Jacobsen, Klæmint Matras og Heini í Skorini.

## Góðar fortreytir

Við hesari blanding av bæði yngri og eldri kreftum er eingin ivi um, at B36 aftur í ár fer at liggja heilt ovarlaga á stigatalvuni í føroysku landskappingini. Harafturat telist Jóannes Jakobsen millum okkara allarfremstu venjarar, og hann er kendur sum ein venjari, ið dugir ómetaliga væl at fara um sínar leikarar. At B36 harafturat hevur sett vágbingin Magna Mohr sum hjálparvenjara við teirri kropsligu venjingini sum høvuðsábyrgd, kann eisini koma at hava ein týðandi leiklut, so hvørt sum kappingin líður. Øll vita vit, at miðvís kropslig venjing kann verða við til at forða fyri skaðum, og tað kann gerast ógvuliga avgerandi í kappingini um føroyameistaraheitið. Tað er tí lítið at ivast í, at fær Jóannes Jakobsen kabaluna at ganga upp, verður tað B36, sum við kappingarlok fer at oyðileggja gulldreymarnar hjá jubileumsfeløgunum KÍ og HB.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Tróndur Vatnhamar | 14/-18 (1-0) | | |
| **Verja** | | | |
| Jens Kristian Hansen | 15/4 (0-0) | 44/3 | |
| Pól Thorsteinsson | 16/0 (1-0) | 31/0 | VB, NSÍ |
| Egil á Bø | | | EB/Streymur |
| Arnbjørn Danielsen | | 7/0 | B68 |
| Jóhannis Joensen | | 17/0 | FS Vágar, HB |
| Bárður Joensen | | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Kenneth Jacobsen | 15/0 (3-0) | | |
| Niels Joensen | 12/0 (2-0) | | |
| Bergur Midjord | 10/0 (0-0) | | |
| Klæmint Matras | 18/2 (2-1) | 1/0 | |
| Ronnie Samuelsen | | | EB/Streymur |
| Heini í Skorini | 4/0 (1-0) | | |
| Allan Mørkøre | 17/3 (2-1) | 54/1 | KÍ, HB |
| Jens Erik Rasmussen | | 25/2 | HB, FS Vágar |
| Sverrir Kjærbo | 13/0 (0-0) | | |
| Alex José dos Santos | | | |
| Ásbjørn V. Gunnarsson | | | |
| Jóhan V. Gunnarsson | | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| John Petersen | 18/10 (1-0) | 52/8 | B68, GÍ |
| Bárður Mortansson | 3/0 (1-0) | | HB |
| Tórálvur Poulsen | 1/0 (0-0) | | |
| Levi Hansen | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Jóhannis Joensen | | | FS Vágar |
| Jens Erik Rasmussen | | | FS Vágar |
| Arnbjørn Danielsen | | | B68 |
| Ronnie Samuelsen | | | EB/Streymur |
| Egil á Bø | | | EB/Streymur |
| Alex José dos Santos | | | Frem |
| **Frágongd** | | | |
| Jákup á Borg | 17/7 (2-0) | | HB |
| Heðin á Lakjuni | 18/9 (2-0) | | HB |
| Fróði Clementsen | 13/0 (1-0) | | EB/Streymur |
| Rúni Elttør | 16/0 (0-0) | | ÍF |
| Julian Johnsson | 4/0 (1-0) | | ÍA Akranes |
| Sonni Johansen | 6/0 (1-0) | | FS Vágar |
| **Venjari** | | | |
| Jóannes Jakobsen | | | |



# Vit hava bestu verju í Føroyum

**Ársins leikari í Føroyum í fjør, vágbingurin Pól Thorsteinsson, hevur nú leikt í B36 í nøkur ár. Pól heldur ikki, at liðið hjá B36 í ár er tað besta, ið hann hevur verið við á, men tó sigur hann, at teir hava Føroya bestu verju**

**Terji Nielsen**
*terji@sosialurin.fo*

Uttan fyri vøllin er Pól Thorsteinsson ikki ein av teimum, ið ger nógv hóvasták burtur úr sær sjálvum, men tá hann fer á vøllin, er hann ógvuliga sjónligur.

Hann er stýrmaðurin í verjuni hjá B36, og at hann hevur stóra virðing millum mótstøðuleikarar og venjarar, er heitið sum ársins leikari 2003 besta prógvið um.

## Breiður hópur við fáum profilum

Pól Thorsteinsson hevur leikt á nógvum góðum B36-liðum, og sjálvur heldur Pól, at liðið í 1999 og liðið í 2001 eru tey bestu, ið hann hevur verið á. Um liðið í ár sigur Pól Thorsteinsson, at tað er nógv gott fólk, men tað eru ikki so nógvir profilar, sum tað mangan hava verið áður. Hetta heldur Pól verða ein vansa, tí í teimum avgerandi dystunum eru tað ofta profilarnir, ið munurin á sigri ella tapi. Undan hesum kappingarárinum hava vit mist so markantar profilar sum Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni, men vit hava eisini fingið nógv nýtt og gott fólk, sigur Pól Thorsteinsson.

Serliga er tað í verjupartin, at B36 er nógv styrkt undan hesum kappingarárinum, og Pól Thorsteinsson er ikki í iva um, at ástalsfelagið í Havn hevur Føroya bestu verju við monnum sum Jens Kristian Hansen, Jóhannis Joensen, Arnbjørn Danielsen, Egili á Bø umframt Póli sjálvum. Hóast triggir av hesum eru komnir til felagið undan hesum kappingarárinum, heldur Pól tað ikki verða nakran trupulleika at fáa verjuna samanspælda, tí bæði Arnbjørn og Egil hava áður leikt í B36 saman við Pól Thorsteinsson og Jens Kristian Hansen, og harafturat hava Johannes, Jens Kristian og Pól leikt saman í verjuni á føroyska landsliðnum nakrar ferðir.

## Nakað tunnir har frammi á vøllinum

Størsti veikleikin hjá B36 í ár heldur Pól Thorsteinsson verða, at teir ikki hava so nógv fólk at taka av til plássini har frammi á vøllinum. Í fjør hevði John Petersen teir báðar Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni undir liðuni á sær, men í ár er bert John eftir, og tað merkist. Nýggi brasilianski leikarin hjá B36, Alex, er framrættaður miðvallari, og honum væntar Pól nógv av, men heilt har frammi manglar eitt sindur av fólki, heldur hann.

Ein av avgjørdu styrkunum hjá B36 í mun til onkran av kappingarneytunum er tann breiði hópurin heldur Pól Thorsteinsson. Ástalsfelagið hevur helst breiðasta hópin í landinum, og tað kann gerast rættiliga avgerandi, so hvørt sum kappingin líður, heldur vágbingurin.

## HB eru favorittar

Um landskappingina í ár sigur Pól Thorsteinsson, at hann hevur HB sum favorittar til at vinna meistaraheitið triðja árið á rað.

Pól Thorsteinsson sigur, at hann hevur HB sum favoritt, tí at teir reyðu og svørtu í mun til B36 hava fleiri leikarar á liðnum, ið kunnu avgera ein dyst. Hesir leikarar, ið einsamallir kunnu vinna ein dyst fyri lið sítt, hava ótrúliga stóran týdning, tá ið tað stendur á, og í tí førinum er HB betur fyri enn vit, sigur Pól Thorsteinsson. Vágbingurin heldur eisini, at tað verða nøkur stig niður til



*Vágbingurin Pól Thorsteinsson er stuðulsspælari í havnarfelagnum B36*

*Mynd: Finnur Justinussen*

triðfremsta liðið í deildini, og her væntar hann, at tað fara at verða lið sum KÍ og NSÍ, sum fara at stríðast um bronsuna.

## Gott við kropsligum venjara

Sum nakað nýtt í Føroyum hevur B36 í ár fingið sær ein kropsligan venjara, Magna Mohr, ið eins og Pól Thorsteinsson er vágbingur, og at hava ein slíkan venjara er nakað, ið Pól fegnast um. Hann sigur, at venjingin er eitt sindur øðrvísi nú, eftir at B36 hevur sett Magna Mohr at taka sær av tí kropsligu venjingini, og at kropsliga venjingin ikki er eins drepandi, sum hon mangan fyrr hevur verið. Ein stórur partur av kropsligu venjingini fer fram við bólti, sigur Pól Thorsteinsson, og tað fellur altíð í góða jørð millum okkum spælarar.

B36 hevur í ár fingið nýggjan venjara í Jóannesi Jakobsen, og tað er nakað, ið Pól Thorsteinsson er glaður fyri. Hann hevur áður havt Jóannes sum venjara í VB, og tað dámdi honum stak væl. Pól dylur heldur ikki fyri, at honum altíð hevur dámt best at havt føroyskar venjarar og at spæla saman við føroyskum leikarum.

## Ongar ábreiðslur frá vágbingum

Tað er ikki altíð líka væl umtókt, tá ið ein leikari fer úr barndómsfelagnum fyri at leika við onkrum øðrum felagi, men hetta er ikki nakað, ið Pól Thorsteinsson kennir nakað til. Sjálvt um tað eru nøkur ár síðani, at Pól fór úr VB, hevur hann ongar ábreiðslur fingið frá vágbingum. Tey hava altíð góðtikið, at eg spæli norðanfjørðs, nú tá ið eg búgvi her, og tað eri sjálvsagt glaður fyri, sigur landsliðsleikarin.

Spurdur um hann nakrantíð fer at venda aftur til barndómsfelagið, sigur Pól Thorsteinsson, at tað dugir hann ikki at siga. Hann sigur tó, at fer hann aftur til VB at leika, so verður tað ikki fyri at taka sær løttum, men fyri at geva alt hvat hann eigur, og tað er ikki so lítið!

### Metingin

B36 misti nakrar lyklaleikarar undan hesum kappingarárinum, men tilgongdin hevur verið so mikið stór av sterkum leikarum, at hópurin hjá B36 í ár helst er tann sterkasti í landinum. Um nýggi venjarin, Jóannes Jakobsen, fær nógvu nýggju leikararnar samanspældar til eitt lið, verður tað ógvuliga trupult hjá hinum liðunum at basa B36.